## Ikki nøgdur

Heini Hátún hevði til oyggjaleikirnar hesaferð vónað, at tað kundi eydnast at fáa eina bronsumedalju. Hetta skuldi eisini verið gjørligt, um køstini hjá Heina vórðu sammett við tey hjá luttakarunum á leikunum, men í evstu løtu komu tvær tilmeldingar afturat.

Og lagnan vildi tað soleiðis, at teir báðir, sum komu afturat í evstu løtu, báðir kastaðu longur enn Heini, sum soleiðis mátti taka til takkar við fimta plássinum.

Nakað annað er so tað, at Heini helst ikki var so øgiliga væl nøgdur persónliga. Besta kastið hjá honum var 12,65 metrar, og tað er á lið ein metur undir tað, sum Heini áður hevur kastað. Í samlaðu støðuni hevði hesin meturin tó ikki munað tað stóra. Munurin upp til fjórða plássði var nærum hálvan annan metur.

**-jm**



*Hóast persónliga metið neyvan hevði broytt um plaseringina, so var Heini Hátún ikki nøgdur um teir 12,65 metrarnar, sum hann tveitti kúluna*

## Sam varð aftastur

Á føðingardegnum sunnudagin royndi Sam Vang seg fyri fyrstu ferð á 3.000 metra forðarenning, og tó at hann kom aftastur á mál, so var tað kanska ikki hetta, sum Sam sjálvur legði mest í. Hetta var nevnliga fyrsta ferðin, at Sam royndi seg í greinini, og so var tað ein avbjóðing bara at fylgja so nøkunlunda við feltinum.

Seinni á leikunum skal Sam ætlandi eisini royna seg á 5.000 metra teininum.

**-jm**

# Metrar afturat metinum

**Randi Kúrberg so legði so væl og virðiliga oman á føroyska metið í spjótkasti, tá hon sunnudagin kastaði út á 33,19 metrar**

SPJÓTKAST
*Jákup*

**Lerwick:** At støðið á oyggjaleikunum er alsamt hækkandi, mundi kappingin í spjótkasti sunnudagin vera eitt gott dømi um. Randi Kúrberg, sum tók lut á triðja sinni, kastaði í sínum besta kasti bara góðan metur undir tí, sum gav bronsu á leikunum seinast, men hesa ferð rakk tað bara til eitt pláss sum nummar átta av teimum átta luttakarunum.

Men hóast plaseringin soleiðis kanska ikki var akkurát tað, sum Randi ætlaði, so er einki at ivast í, at hon var nøgd um avrikið. Í triðju royndini tveitti hon nevnliga spjótið út á 33,19 metrar, og tað er nakað væl oman fyri gamla metið hjá Randi. Hetta var 31,36 metrar, so talan var um eina betran á nærum tveir metrar!

Og sjálv duldi Randi ikki fyri, at tað var júst einum slíkum kasti, sum hon hevur strembað eftir seinastu tvey árini.

- Tað kanst tú ætla. Ikki minst, tá talan er um slíka kapping.



*Randi timaði tað perfekt, tá hon á oyggjaleikunum kastaði sítt nógv besta kast nakrantíð*

- Eitt er, at tað gongur væl undir venjing, men tá verður tað so nógv tað sama. Eg sleppi jú so sjáldan at taka lut í veruligum kappingum, og tí gangi eg fyri tað mesta og tøssi einsamøll. Eg havi verið úti á 32,77 undir venjing, so hetta er nakað nógv betri. Og at tað so er á oyggjaleikum er bara fantastiskt.

Men tað sær kortini út til, at hinar betra seg skjótari. Hongur tað kanska eisini saman við, at tær sleppa til fleiri kappingar.

- Eg kann ikki gera nógv annað, enn royna at fylgja við. Sjálvt um eg havi betra meg nógv, síðani eg tók lut fyri fyrstu ferð á Man í '01, so meg, so er støðið hækkað munandi. Men soleiðis er tað bara, segði ein fegin Randi Kúrberg at enda.

# Gjøgnumførdi við skaða

**Lerwick:** Bæði Guttorm Sørensen og Cecil Weihe tóku lut, tá runnið varð á 10.000 metrum sunnudagin. Oddadysturin stóð alla tíðina millum Michael Sanchez av Gibraltar og Kim Godtfredsen av Grønlandi. Ein dystur, sum Gibraltar-búgvin vann.

Guttorm Sørensen var leingi væl við í feltinum, sum kappaðist um fjórða plássið, men seinasta triðingin av kappingini gjøgnumføri Guttorm við skaða, og tað kostaði nakað nógv í samlaðu støðuni.

Her kom Guttorm á mál sum nummar átta við tíðini, 37.08,11. Cecil Weihe gjørdist nummar seks í tíðini, 35.23,74.

**-jm**

*Guttormur Sørensen og Cecil Weihe vóru føroysku umboðini á 10.000 metrum, men tað eydnaðist hvørgum teirra at gera vart við seg. Og ikki minst mundi tað kennast keðiligt hjá Guttorm, at hann fekk skaða, tá teinurin var gott og væl hálvrunnin*

*Myndir: Jens Kristian*









Bermuda-Cayman 3-0:

## Frískligt lot í flogbóltinum

**Lerwick:** Eftir at menninir av Cayman oyggjunum teir báðar seinastu leikirnir hava sýnt flogbóltsspæl, sum í øllum førum hevur verið undirhaldandi við knallhørðum smashum og einvísum álopsspæli, tykist tað nú vera Bermuda, sum stendur fyri tørni.

Júst Cayman var fyrsta mótstøðuliðið hjá Bermuda, nú teir fyri fyrstu ferð tóku lut í flogbóltinum, og hendan dystin vann Bermuda.

Tí er kanska ikki heilt óhugsandi at rokna við, at teir verða mótstøðuliðið hjá tí liðnum, sum vinnur dystin millum Føryoyar og Áland.

Tað skal tó samstundis leggjast afturat, at hóast undirhaldandi, so tykist lítið sannlíkt, at Bermuda skal skal hvørki føroysku ella álendsku menninar. Taktiskt er liðið als ikki so sterkt, og hugurin at royna nakað annað enn flottu smashini tykist liggja á einum hampuliga lítlum stað.

Men við framgongdini, sum eitt nú Cayman longu hevur sýnt, so er væl møguligt, at hesar báðar oyggjarnar í framtíðini av álvara verða tvær av teimum, sum fara at bjóða av á mannfólkasíðuni í flogbólti.

**-jm**